# Býr í Svínoy og arbeiðir

## Tá Hanna Jacobsen fer til arbeiðis er talan um ein rættiliga langan veg at fara. Hóast langa vegin úr Svínoy til sambýlið í Gøtu, trívist hon væl í arbeiði sínum og væl í heimbygdini



*Hóast handil er í bygdini, er gott at ein kann bíleggja ymiskt aðrastaðni frá. Regin er júst komin við millum annað rundstykkjum til Honni*
*Mynd: Høgni Thomsen*

BYGDARLÍV

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Svínoy:** - Hetta var ein óførur dagur í dag. Veðrið er av tí fagrasta, og so fái eg so fínar gestir á gátt í morgun, sigur Hanna, her hon stákast í køkinum heima við hús.

Hetta er ein serligur dagur, hesin mánadagurin í hesi vikuni. Í dag skal Hanna og bygdarfólk hennara avgera, um kommunan skal leggja saman við Klaksvík ella ikki.

Við Másanum eru eisini umboð fyri tíðindatænastuna og tvey umboð fyri Landsverk. Og hesi koma øll inn á gátt hjá Honnu henda fyrrapartin til ein góðan kaffimunn.

Til høvið hevur hon bílagt sær rundstykkir frá bakarí'inum hjá Jórun í Klaksvík, og komu hesi út við somu rutu sum gestirnir.

Blíðskapurin er óførur í heiminum hjá Honnu og Eyðuni, og tað er týðiligt at merkja, at her skulu tey vitjandi føla seg væl.

- Eg havi frí frá arbeiði mínum beint nú. Og tá eg eri her úti, takist eg við alt tað, sum hoyrir einum heimi til.

- Okkum báðum dáma sera væl heimabakað breyð, so tað geri eg eisini nógv av, tá eg eri her úti, sigur 58 ára gamla Hanna Jacobsen.

### Langur vegur til arbeiðis

Ofta verður tosað um fjarstøðuna millum heim og arbeiðspláss, og hvussu neyðugt tað er at henda er so stutt sum gjørlig.

Nógv fólk av bygd og sum arbeiða í Suðurstreymoy, vita alt um henda týdning. Og tað ger Hanna eisini – hóast hennara vegur til arbeiðsplássið í Gøtu fer fram bæði yvir sjógv, yvir land og undir sjógv.

Hon fer av bygdini við Másanum til Hvannasund, og haðani frá koyrandi til Gøtu umvegis Norðoyatunnilin.

- Men lat meg bara siga, at tað hevði als ikki borið til at arbeitt har, um vit ikki høvdu eini minni hús í Klaksvík, slær Hanna fast.

Við ferðaætlanini sum nú er, ber ikki til hjá henni at fara til arbeiðis um morgunin og verða heima aftur um kvøldið.

### Føla húsini sum eitt heim

Skipanin við arbeiðinum hjá Honnu er soleiðis, at hon til dømis kann arbeiða í fimm dagar, meðan hon síðani hevur frí í seks teir næstu.

> *Hví fert tú ikki í skúla?!, spurdi hann meg beinleiðis*

Sjálv er hon sera væl nøgd við hesa skipanina, men at skula arbeiða í Gøtu, búgva ein part av tíðini í Klaksvík og ein part av tíðini í heimbygdini Svínoy, var ein heldur óvanlig støða fyri Honnu.

- Satt at siga, var tað eitt sindur merkiligt í fyrstuni. Eg voyt ikki, man má líkasum hava eitt einstakt stað at búgva í.

- Eg dugdi líkasum ikki at føla húsini í Klaksvík sum eitt heim, tí eg bara hevði búð her úti í Svínoy. Men tað eri eg komin yvir nú, so nú føli eg meg eisini heima í Klaksvík, slær hon fast.

### Ikki fyri mína skyld!

Í samband við ætlaðu samanleggingina av Klaksvíkar og Svínoyar kommunu, hevur tosið um eitt sambýli fyri eldri verið upp á tal í Svínoy.

Men fyri Honnu var hetta